


SNARAÐUR

*So gekk ikki longur. Kappingin móti innfluttu bíligu breyðunum gjørdist ov hørð, og Grón hevur nú latið aftur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# GRÓN GEVUR SKARVIN YVIR

**AFTURLATIÐ – Kappingin móti bíligu innfluttu breyðunum gjørdist ov tung, og tí var einki annað at gera enn at gevast við virkseminum, sigur Sveinur Thomasen, stjóri í Grón.**

Leo Poulsen

Hørðu tíðirnar hava nú kostað bakarínum Grón lívið.

Klokkan 14 í gjár legði Grón alment virksemi sítt niður, og eini 20-25 fulltíðarstørv fóru fyri skeytið.

– Vit hava roynt at rationalisera og at minka um hølini, men nú var so komið hartil, at einki var at gera meira, sigur Sveinur Thomasen, stjóri í Grón.

Teir hava eisini roynt ymiskt annað fyri at fáa tað at mala runt. Eitt nú gjørdu teir døgurða, men tá virksemið minkaði millum handverkarar, var heldur ikki grundarlag fyri tí meiri.

– Eg haldi annars, at vit liggja nokk so væl fyri við hópinum av handlum rundan um okkum, men vit mugu bara ásanna, at tað ikki ber til longur, sigur Sveinur Thomasen.

Hann heldur ikki, at tað er kappingin við hini føroysku bakaríini, sum hevur verið trupulleikin.

– Tað er bíliga innflutta breyðið, ið spakuliga hevur kvalt okkum. Avgjaldið er bara tvær krónur á innflutta breyðnum, so vit fáa ikki somu lagaligu kappingartreytir sum bøndirnir fáa, sigur Sveinur Thomasen.

## Harmiligt

Eigararnir hava roynt alt tað, ið roynast kann, men mugu viðganga, at nú gongur ikki meiri.

– Tá bankin ikki longur trýr upp á verkætlanina, so ber ikki til meira, hóast sigast má, at bankin hevur verið ógvuliga tolin, sigur Sveinur Thomasen.

Hvat so hendir frameftir er ikki heilt greitt, men tó stendur fast, at Grón er farið í søguna.

– Felagið er upployst, og verður ikki til frameftir. Og tað serliga harmiliga er, at kreditorar missa pengar og uppaftur meiri harmiligt, at 20-25 fólk missa starvið nú so tætt upp undir jól, sigur Sveinur Thomasen.

Søgur eru longu farnar at ganga um, at Rúsan skal flyta inn í hølini, har Grón hevur verið, men tað er so ein onnur – søga.

## 5000 krónur í bót fyri umhvørvisdálking

Leo Poulsen

5000 krónur í bót.

So nógv kostaði tað einum bónda, at hann sambært ákæruvaldinum legði eina mykjurúgvu ov nær einum vatni, har kommunan tekur sítt drekkivatn til borgararnar úr.

Tað var kommunan saman við løgregluni, sum skuldsettu bóndan fyri at leggja mykjurúgvuna í ein skráning oman móti vatninum, har mett var, at vandi var fyri, at rúgvan partvís kundu ríða oman í vatnið.

Tað var 2. mai 2009, at bóndin bleiv steðgaður og skuldsettur fyri brot á umhvørvislógina. Sjálvur helt bóndin lítið um ákæruna, tí hann sigur seg hava lagt mykju har um leiðir í 25 ár, uttan at tað hevur verið mett sum vandi fyri umhvørvisdálking.

Somuleiðis fíltist bóndin á, at hann ikki sjálvur fekk møguleika at beina mykjuna burtur.

Umrødda vatnið liggur í haganum hjá bóndanum, og spurningurin kom upp í rættinum, um bóndin hevði lagt mykjurúgvuna so nær vatninum í einari provokatión móti kommununi, tí hon ikki hevði vilja gjørt nakra avtalu við bóndan um at taka drekkivatn út vatninum. Men hesum vísti bóndin aftur og staðfesti, at soleiðis hevði hann gjørt í 25 ár.

Ákærin kravdi bóndan dømdan eftir ákæruritinum og mælti til eina bót á 5.000 krónur. Verjin hinvegin kravdi frídøming, men dómarin valdi at ganga ákæruvaldinum á møti og dømdi bóndan eina bót á 5000 krónur fyri at koma umhvørvinum í vanda.